GJALDSTOVAN

# Tíðaravmarkan av lønum í ársroknskapinum

Tað hevur verið ymiskt, hvussu stovnar, kommunur og samstørv hava tikið lønarskylduna um ársskiftið við í ársroknskapin. Fyri at skapa greiðu á hesum spurningi hevur Fíggjarmálaráðið í viðlagda rundskrivi og talvu ásett, hvørjar lønarskyldur skulu skrásetast, og hesar ásetingar koma í gildi fyri framløguna av roknskapinum fyri 2020.

Meginreglan í § 13 í roknskaparkunngerðini er latingarmeginreglan, sum merkir, at ein útreiðsla skal verða skrásett, tá ið vøran ella veitingin verður framd. Lønarútreiðslur skulu tí sum meginregla verða tiknar við í tí roknskaparári, rætturin til lønina verður innvunnin.

Stovnar, kommunur og samstørv, sum higartil hava tíðarmarkað lønir eftir øðrum meginreglum enn latingarmeginregluni, t.d. eftir kontantmeginregluni, fáa sannlíkt eina tøkniliga meirútreiðslu í 2020 av broytingini. Hendan tøkniliga meirútreiðslan skal ikki takast við í raksturin 2020. Í staðin skulu roknskaparpostarnir fyrst í tí fíggjarárinum, tá ið broytingin verður framd (2020), verða tillagaðir, so teir vísa ta upphædd, teir høvdu havt, var broytingin gjørd frammanundan fíggjarárinum (2019). Bert broytingin í lønarskylduni frá 31. desember 2019 til 31. desember 2020 skal verða tikin við í raksturin 2020.

Viðlagt er eitt oyðublað, sum stovnar og samstørv, sum skráseta í Búskaparskipan landsins skulu brúka til tíðaravmarkanina. Talstavirnir á reglunum í oyðublaðnum vísa til punktini í teirri talvu, sum er hjáløgd rundskrivinum. Oyðublaðið skal verða sent til Gjaldstovuna, sum bókar avsetingarnar. Tíðarfreistin er 12. februar 2021.

Eru spurningar um, hvussu tøkniliga verður farið fram, kunnu tit venda tykkum til Odd Bjellvåg, odd@gjaldstovan.fo

Dømi um, hvussu oyðublaðið kann verða fylt út, er lagt við. Bæði sum word skjal og sum excel skjal. Tilfarið liggur eisini á gjaldstovan.fo og Ársroknskapurin 2020.

g.v.

Odd Bjellvåg